

*Bygdarráðið í Bíggjar Kommunu hevði mánakvøldið fyrsta fundin í ár. Av støarmálum í ár verður at fáa nýggja vatngoymslu í Bø og at gera Gásadlas bygd klára at taka í móti feðrsluni, sum væntandi verður, tá tunnilin verður latin upp*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nýggjan vatnbrunn í Bø

**Bygdarráðið í Bø hevur havt fyrsta fundin í ár, har ætlanin fyri árið varð løgd. Eitt tað størsta málið í ár verður at gera nýggjan vatnbrunn í Bø**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

**Bø:** Nýggja vatngoymslu og vegføring í Bø, umframt kirkjugarð og vegagerð í Gásadali, eru høvuðsmálini Bíggjar Kommuna fer at arbeiða við í ár, sigur borgarstjórin.

Í Bíggjar Kommunu eru tvær bygdir, Bøur og Gásadalur. Báðar eru smáar, so fíggjargrundarlagið er ikki tað stóra. Men skattaprosentið man vera tað lægsta í landinum ella í hvussu er heilt nær við, sigur Jógvan Páll Joensen, borgarstjóri í Bíggjar Kommunu. Skattaprosentið er 15,75, og barnafrádráturin er 3.000,- krónur.

Børnini eru nógv í Bø. Gott 20 børn í og undir skúlaaldri. Samlaða fólkatalið í Bø liggur umleið 70 fólk, og fólkið er ungt. Elsti maður í bygdini hevur ikki fylt 70 ár. Hinvegin er støðan so beint øvugt í Gásadali, sigur borgarstjórin.

Tað størsta takið hjá Bíggjar Kommunu í ár verður at fáa nýggja vatngoymslu í Bø, sigur Jógvan Páll Joensen. Ein nýggjur glastrevjbrunnur, sum tekur 60 rúmmetrar, er keyptur fyri einar 100.000,- krónur. Umframt fer tað so at kosta umleið tað sama at seta upp og binda í, sigur hann. Nýggja vatngoymslan fer at taka kelduvatn, sum ikki hevur verið brúkt fyrr í Bø. Vatnið hevur higatil verið tikið úr áunum.

Vegurin, sum gongur gjøgnum Bíggjar bygd skal eisini broytast eitt sindur. Miðskeiðis í bygdini, beint niðan fyri skúlan, skal vegurin flytast nakað omaneftir. Økið er fingið til vega, og farið verður undir arbeiðið nakað skjótt.

Útstykking er í gongd í Bø. Kommunan hevur 11 grundstykki tøk, og eini fýra eru umbiðin. Tað eru mest lokal fólk, sum hava biðið um grundstykki í Bø, sigur Jógvan Páll Joensen. Tó leggur hann afturat, at heilt klárt er tað ikki, tí útskifting fer fram í løtuni. Men tó so mikið, at fólk eru farin at byggja.

Í Gásadali, sum er hin bygdin í Bíggjar Kommunu, eru eisini ávís ting at avgreiða í ár, sigur borgarstjórin í Bíggja Kommunu.

Fyrsta, sum farið verður undir, er at vaksa um kirkjugarðin í Gásadali. Hann er ov lítil og má víðkast beinanveg, sigur Jógvan Páll Joensen.

Skúlin í Gásadali skal eisini setast í stand. Skúlin hevur ongan miðstøðuhita, og hann er klæddur innan við plátum. Tað skal broytast, og klæðast skal við timbri innan, soleiðis at hann fer at líkjast skúlanum í Bø, sigur borgarstjórin.

Gásadalur stendur fyri at fáa vegsamband við restina av oynni, og tað fer at broyta bygdina munandi. Allir vegirnir í bygdini mugu gerast av nýggjum, tí eingin vegur í Gásadali er gjørdur til at taka í móti nógvari bilferðslu.

Eisini í Gásadali er áhugi fyri at fáa grundstykki, sigur Jógvan Páll Joensen. Kommunan fer at gera byggiklárt í Gásadali, og onkur umsókn er komin um at fáa grundstykki har uppi. Okkurt hús er longu bygt, men tað verður neyvan tann stóra byggingin í Gásadali í ár kortini, væntar borgarstjórin í Bíggjar Kommunu.

Hann sigur, at tað fyrsta, sum verður at gera í tí málinum, er at fáa eina heildarloysn yvir, hvussu farast skal fram við bygging í Gásadali.



*Útstykkingin í Bø verður gjørd ovast í bygdini niðan móti nýggja landsvegnum til Gásadals*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Skúlin í Gásadali, vinstrumegin á myndini, skal umvælast, eins og allir vegirnir skulu gerast av nýggjum. Eisini skal kirkjugarðurin víðkast*

*Mynd: Edvard Joensen*



# Fiskaframleiðsla á føroyska landgrunninum

**Nógv data og nógv tilfar er fingið til vega, síðan Magnus Heinason gjørdist havrannsóknarskip hjá Fiskirannsóknarstovuni fyri stívliga 20 árum síðan**

KUNNING
*Vilmund Jacobsen*

Í døgunum, 27. januar til 3. februar, skipar Fiskirannsóknarstovan fyri áhugaverdari framsýning umborð á Magnusi Heinassyni. Skipið kemur at liggja við bryggju á ymiskum støðum kring landið - ein dag á hvørjum plássi. Høvið verður hjá skúlaflokkum í framhaldsskúlunum og øðrum áhugaðum at vitja umborð.

Lagt verður fyri í Miðvági, 27. januar; síðan verður vitjað í Runavík, Tvøroyri, Klaksvík, Havn, og ferðin endar á Sandi, 3. februar.



*Nú fáa næmingar í framhaldsskúlunum kring landið høvið at hoyra um og síggja ein part av tí arbeiði, sum Fiskirannsóknarstovan fæst við.*

## Fyrilestur

Hvørt kvøld verður fyrilestur á staðnum, har øll eru vælkomin. Evnið er: Hvat stýrir fiskaframleiðsluni á føroyska landgrunninum?

Greitt verður eisini frá royndum við reiðskapi, og undirsjóvarfilmar verða vístir.

– Fyrilesturin byrjar hvørt kvøld kl. 20, men frá kl. 18 eru fólk vælkomin at vitja umborð og síggja framsýningina, sum er sett upp umborð á skipinum, sigur leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni, Hjalti í Jákupsstovu.

## 20 ár á baki

Í góð 20 ár hevur Magnus Heinason verið havrannsóknarskip hjá Fiskirannsóknarstovuni.

– Nógv data og nógv tilfar er fingið til vega við skipinum hesa tíðina. Til tess at siga frá hesum arbeiðnum, bjóða vit framhaldsskúlanæmingum umborð at vitja. Næmingarnir sleppa eina rundferð umborð á skipinum, har teir sleppa at síggja ymisk tól og útgerð, úrslit frá kanningum, ymisk fiskasløg og annað, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

# Vesturbúgvin og Grønanesi fullfermdir av upsa

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Trolararnir, Vesturbúgvin og Grønanes, hava landað í Vestmanna í vikuni.

Sagt verður, at bæði skipini vóru full undir lúkurnar av góðum upsa.

Á Fiskavirking í Vestmanna hava tey havt úr at gera í hesum árinum, nú virksemið á virkinum hjá felagnum í Saltangará hevur ligið stilt, tí maskinur eru fluttar í nýggju hølini. .

– Vit arbeiða við tveimum vaktum hvønn dag, og vit arbeiddu eisini seinasta leygardag, siga tey í Vestmanna.

Nú er virksemið í Saltangará tikið uppaftur, og tí liggur heldur minni trýst á virkinum í Vestmanna. Tó ivast tey ikki í, at nóg mikið verður at gera í Vestmanna komandi tíðina.

Hetta er góð fiskitíð, og nógvur fiskur hevur verið at fingið allan betur.

# Eysturbúgvin landað á Sandi

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Eysturbúgvin, sum partrolar við Vesturbúgvanum, hevur landað á Sandi hesa vikuna. Teir høvdu umleið 200.000 pund, meginparturin góður upsi.

Á Sandoy Seafood vænta tey ongan bát aftrat hesa vikuna, men nakað av fiski hava tey keypt á uppboðssølu. Nóg mikið er tískil at gera á báðum virkjunum kortini.

Bæði á Sandi og í Skopun hevur nógv fiskaarbeiði verið, síðan verkfallið var av, og fyrstu skipini komu innaftur.

Í fyrra helmingi av januar var gott veður, og útróðrarbátarnir fingu væl av fiski.

Seinastu dagarnar hevur verið illsligt veður og harður streymur.

– So, nú er lítið komið burtur úr hjá útróðrinum, siga tey á Sandoy Seafood.

# Sangfegnir suðuroyingar fara undir venjing

**Sangkórið í Suðuroyar Norðaru helvt fer núy undir venjing aftur. Kórið er fyri øll, ung sum gomul, roynd sum óroynd**

KÓRSANGUR
*Áki Bertholdsen*

Nú fer sangkórið í Suðuroyar Norðaru helvt aftur undir venjingarnar og øll sum eru áhugað í vanligum kórsangi, eru vælkomin í kórið at syngja.

Venjing er hvørt týskvøld í Hvalbiar skúla frá kl.19.30 til 22.00, men ætlanin er eisini at leggja onkra venjing á Tvøroyri og tað verður eftir avtalu við kórið. Fyrsta venjingin var í gjárkvøldið, men annars eru fólk vælkomin at melda seg tey komandi týskvøldini.

Jens Mortan Mortensen, kórleiðari, sigur, at kórið er mannað við fólki úr suðuroyar norðaru helvt. Kórið sang í kirkjunum í Hvalba, í Sandvík og á Tvøroyri undan jólum. Tey syngja føroyskan og útlendskan kórsang. Og nú farið verður at venja vársangir, er ætlanin at kórið aftur verður at hoyra í kirkjunum í norðaru helvt á páskum.

Hvør fuglur syngur við sínum nevi og kórleiðarin sigur, at tað sum hann leggur dent á við kórinum, er, at øll, ung sum gomul, roynd sum óroynd, skulu kunnu koma í kórið.